


Mynd: Subsea 7

# 70 missa arbeiðið hjá Subsea 7

**Jógvan Hugo Gardar**

06.10.2015 - 08:12

Oljan.fo

Frálandaveitingarfelagið Subsea 7 boðar frá at orsaka av minkandi virksemi í oljuvinnuni, so noyðast tey at minka talið á starvsfólkum við umleið 70 størvum. Kunningarstjórin hjá Subsea 7, Jan Roger Moksnes, sigur í samrøðu við E24 at fyritøkan noyðist at tillaga virksemi hjá flotanum til tað sum er at gera í oljuvinnuni, og tað virksemi minkar í løtuni.

Moksnes leggur afturat at uppsøgnurnar sum koma nú liggið inni í tí ætlanini sum fyritøkan legði fram í mai, har tey framskrivau gongdina. Tá hesi 70 størvini eru burtur, so hevur Subsea 7 eini 120 størv eftir í norsku frálandavinnuni.

Í samband við spariætlanina sum bleiv løgd fram í mai, so legði Subsea 7 upp til at 11 av teirra skipum skulu leggjast fyri teym, samstundis sum eini 2500 størv um allan heim skuldu burtur. Av hesum hvørva nú 70 í norsku oljuvinnuni.

Tey sum missa arbeiði hja Subsea 7 fáa ein fráfarðingarpakka. Hvat sum liggur í honum er ikki kent, men vanliga vil ein slíkur pakki tryggja starvsfolkunum sum fara løn í eitt tíðarskeið aftaná at tey eru givin hjá arbeiðsgevaranum.

Farnamanaðin hava fleiri fyritøkur sagt upp nógv fol. Aker Solutions boðaði í september frá at 500 av teirra starvsfólkum í Noregi mssa arbeiði, meðan ConocoPhillips boðaði frá at 1800 av teirra starvsfólkum missa arbeiðið.

Uppsøgnirnar í norsku oljuvinnuni koma nú dagliga. Mett verður at umleið 25.000 størv eru horvin í norsku oljuvinnuni eftir einum ári. Norska ALS-skipanin, NAV, hevur gjørt eina meting sum sigur at eini 36.000 størv fara at hvørva sum ein avleiðing av lækkandi oljuprisum og minkandi virksemi.